UTTAN ÚR HEIMI

# Evropeiskt átak ímóti mannasmuglarum

**Løgreglan í Írlandi, Belgia, Týsklandi og Italia er farin undir eina skipaða leiting eftir mannasmuglarum, eftir at átta flóttafólk vórðu funnin deyð í einari bingju í Írlandi leygardagin.**

ÚTLAND
*Fartekst*

Trý av teimum deyðu vóru børn, tveir fýra og tíggju ára gamlir dreingir og ein tíggju ára gomul genta. Fimm fólk vóru á lívi, og tey vórðu alt fyri eitt løgd inn á sjúkrahús. Írsku læknarnir siga, at tey eru sera illa fyri, men at tað gongur tann rætta vegin.

Írski lastbilaførarin, sum koyrdi eina bingju við skrivstovuútgerð úr havnini í býnum Waterford til eitt vinnuøki í býnum Wexford, varnaðist, at onkur bankaði inni í bingjuni. Tá hann lat hurðarnar upp, fann hann átta deyð fólk og fimm, sum enn vóru á lívi. Summi teirra høvdu mist virið.

Írsku myndugleikarnir vita ikki, hvaðani fólkini eru, men hildið verður, at tey eru annaðhvørt turkar ella rumenar. Myndugleikarnir vita heldur ikki, hvar tey eru farin inn í bingjuna. Bingjan við skrivstovuútgerðini varð send úr Milano í Italia við toki tann 30. november til Zeebrügge í Belgia, hagar hon kom seinasta týsdag. Úr Zeebrügge fór bingjan við skipi til Waterford í Írlandi, hagar skipið kom hósdagin.

Írsku myndugleikarnir halda, at flóttafólkini hava sníkt seg inn í bingjuna í Belgia, men teir eru eisini sannførdir um, at mannasmuglarar hava skipað fyri. Írski forsætisráðharrin, Bertie Ahern, segði í gjár, at teir seku skulu finnast og revsast.

### Girðingin ov høg

Tilburðurin við teimum trettan flóttafólkunum fekk í gjár flóttafólkamyndugleikarnar í Írlandi, Bretlandi, Italia og Rumenia at almannakunngera eina felags kunngerð. Í henni stóð m. a., at tær høgu girðingarnar, sum forða fólki atgongd til ES-londini, noyða hesi fólk í hendurnar á mannasmuglarunum, sum eru fullkomiliga líkasælir, tá talan er um mannalív.

- Vit biðja tí staðiliga stjórnirnar tryggja, at tey, sum flýggja undan forfylging, kunnu sleppa higar uttan at noyðast at seta lívið í váða á hendan hátt, stóð at enda í kunngerðini hjá flóttafólkamyndugleikunum í teimum fýra londunum.



*Mynd: Reuter*

# Ætlaðu álop á amerikansku kongressina

**Ein av bólkunum hjá Osama bin Laden skuldi søkja at kongressini í Washington beint eftir 11. september**

ÚTLAND
*Fartekst*

Tað er amerikanska tíðarritið Newsweek, sum ber tíðindini um tað ætlaða álopið.

Blaðið skrivar, at ein av teimum sonevndu "sovandi bólkunum" hjá bin Laden skuldi skipa fyri álopinum og seta tað í verk, men limirnir í bólkinum valdu at fjala seg ella at rýma úr USA, tá teir varnaðust, at samveldisløgreglan FBI var í hølunum á teimum.

Fregnartænastukeldur vilja vera við, at tá FBI fór undir at handtaka útlendingar, sum ikki høvdu sítt uppihaldsloyvi í lagi, tók FBI av tilvild nakrar menn, sum skuldu hjálpa bólkinum við álopinum á kongressina. Tá teir í bólkinum frættu, at hjálparmenn teirra vóru tiknir, varð álopið avlýst.

Sambært Newsweek veit FBI framvegis ikki, hvørjir teir fongslaðu hjálparmenninir eru. Síðani 11. september hava amerikansku myndugleikarnir fongslað umleið 650 fólk, sum eru undir illgruna fyri at hava havt samband við yvirgangsvirksemi, og John Ashcroft, løgmálaráðharri hevur sagt, at nøkur av teimum tiknu helst hava havt samband við felagsskapin Al-Qaeda hjá bin Laden.

Ráðharri hevur eisini sagt, at myndugleikarnir hava umleið 5000 fólk, sum skulu avhoyrast í sambandi við illgruna um altjóða yvirgangsvirksemi.

# ETA ger um seg í Fraklandi

**Baskisku loysingarmenninir herða nú ágangin ímóti fronsku myndugleikunum**

ÚTLAND
*Fartekst*

Eitt brandbumbuálop á húsini hjá einum løgreglumanni í býnum Ascain har suðuri í Fraklandi um vikuskiftið var uttan iva ein ávarðing um, at baskiski loysingarfelagsskapurin ETA er í ferð við at breiða sítt blóðuga virksemi norður um franska markið.

Tilburðurin var ikki tann fyrsti. Fyri nøkrum fáum døgum síðani varð ein løgreglumaður illa særdur í skotbardaga millum limir í ETA og fronsku løgregluna. Tríggir ETA-limir vórðu tiknir.

Bretska blaðið The Guardian skrivar, at leiðslan í ETA hevur givið sínum limum í Fraklandi boð um at nýta síni vápn heldur enn at lata seg taka til fanga. Hetta er ein kúvending, tí higartil hava ETA-limir ikki gjørt mótstøðu, tá franska løgreglan hevur handtikið teir.

Seinasta mánaðin hevur nýggi politikkurin hjá ETA elvt til tríggjar skotbardagar millum ETA-limir og franskar løgreglumenn. Tveir løgreglumenn eru særdir í samanbrestunum.

Í Spania hevur harðskapurin hjá ETA kravt umleið 800 mannalív seinastu 30 árini.



# LuciNation givið út fløgu

ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*




*Útisetabólkurin LuciNation gav í gjár út fløgu*

Fløgan hjá útisetabólkinum LuciNation kom í gjár í handlarnar kring landið. Hetta er fyrsta fløgan bólkurin gevur út. LuciNation er mannaður við royndum tónleikarum. Malan Eyðunsdóttir, Tróndur Bogason Hansen, Torkil Olsen, Jógvan Joensen og Petur Dalsgaard, ið øll hava verið við at mynda føroyska tónleikapallin eru tey, ið eru við í LuciNation. Tónleikararnir hava spælt við í kendum føroyskum bólkum, sum til dømis Mark No Limits, Revival, MC-Hár og øðrum.

Bólkurin hevur spælt saman síðani 1996 undir ymsum nøvnum, sum til dømis Malan Eyðunsdóttir Band, AfterMath og nú LuciNation.

Tá bólkurin hevur spælt til dans í Danmark og Føroyum hava tey kalla seg Malan Eyðunsdóttir Band, men tá tey hava spælt konsertir við egnum løgum hava tey rópt seg LuciNation.

Í 1998 vóru tónleikarnir við í kappingini »Emergenza« har tey komu við til annað umfar, og í ár 2000 vóru tey undir navninum AfterMath, við í kappingini »Amager Spot 2000«. Í tí kappingini kom bólkurin heilt til finaluna, men tíverri eydnaðist teimum ikki at vinna, men gjørdist nummar tvey, sum eisini má sigast vera eitt gott úrslit. Kappingin »Amager Spot 2000« svarar til Prix Føroyar í Føroyum, tó er hon meira umfatandi og fleiri bólkar luttaka.

Og var tað eisini henda kappingin, ið gav bólkinum áræði til at fara í holt við at gera eina fløgu – serstakliga tí donsku áhoyrararnir tóku so væl ímóti tónleikinum. Bólkurin hevur havt leysar ætlanir um fløguútgávu síðani 1998, men í ár valdi bólkurin so at gera álvara av ætlanini.

Fløgan er innspæld í nýggjum føroyskum upptøkuhøli í Keypmannahavn, har bólkurin 200 og Annika Hoydal eisini hava gjørt og gera upptøkur. Slagið av tónleiki bókurin spælir er ringt at seta í bás. Harður modernaður rockur er helst besta boðið, men hóast hetta »heitið« er tónleikurin nógv meira umfatandi.

# Dálkingin spældi væl av

HÚSABYGGING
*Ingrid Bjarnastein*



*Høgni Mikkelsen byggir í løtuni 16 raðhús í Øsknagerði í Havn*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Fyri nakað av tíð síðani var talan um at Høgni Mikkelsen skuldi byggja nøkur hús í Øksnagerði har gamla bilupphøggingin var fyrr. Tó bar ikki til at byggja beinanvegin av tí at økið var dálkað av olju.

Nú er byggingin tó byrjað og økið rundan um er alt frítt fyri dálking.

– Dálkingin spældi væl av, sigur Høgni Mikkelsen.

– Tað var ikki so ógvusligt, sum tað varð blást upp til at vera. Býráðið stóð fyri at reinsa økið, og alt er nú gravað vekk. Kanningar eru gjørdar og økið er heilt reint.

Talan er um 16 raðhús, sum eru umleið 100 m2 hvørt. Høgni sigur sjálvur, at tey verða ongantíð ov skjótt liðug. Øll húsini eru longu umbiðin.

Annars liggur ein onnur verkætlan niðri hjá býráðnum í løtuni. Her er talan um 62 íbúðir uppi í Berjabrekku. Hendan verkætlan er tó ikki góðkend enn.

Framtíðarvinnan í brennideplinum:

# Stór KT-Stevna í ár 2002

Endamálið við stevnuni er at lýsa førleikar hjá føroysku KT-vinnuni í dag, og hvussu teir bestu karmarnir fyri eini burðardyggar KT-vinnu kunnu verða skaptir.

19. og 20. apríl í ár 2002 fara Norðurlandahúsið og Útvarpshøllin at hýsa eini stórari KT-stevnu.

KT-felagið stendur aftanfyri stevnuna. Fyrri parturin av málsetninginum er ætlanin at náa við eini framsýning, meðan seinni parturin skal ætlandi røkkast við eini minni ráðstevnu.

Næstan allar KT-fyritøkur í Føroyum fara hesar báðar dagarnar at sýna fram tað tær hava at bjóða. Umframt egnar básar, verður eisini møguleiki hjá fyritøkunum at gera brúk av einum sokallaður showrúmi.

Nakrar útlendskar fyritøkur vera eisini við, og er longu onkur tilsøgnin komin frá onkrum av teimum stóru aktørunum á altjóða marknaðinum.

Norðurlandahúsið kemur at virka sum framsýningarhøll, meðan Útvarpshøllin verður nýtt til fyrilestrar, har bæði føroyskir og útlendskir fyrilestrahaldarar koma at greiða frá nøkrum av tí, sum rørir seg innan KT-heimin í dag. Høvuðsfyrilestrahaldararnir eru útlendingar, men eisini verða føroyskir fyrilestrahaldarar á skránni.

Tann fyrri av teimum báðum døgunum, verður skipaður sum ein Business to Business dagur, har neyðugt verður at melda seg til fyri at vera við. Hesin dagurin hevur eina neyva skrá, og byrjar hann við, at stevnan verður sett, helst av landstýrismanninum í vinnumálum.

Seinni dagurin er almennuur, og av tí hann er leygardagur verður roknað við nógvum vitjandi hendan dagin.

Stóra KT-stevnan rundar av við einum stórum gallakvøldið, og vóna fyrireikararnir at hetta kemur at vera ein góð samanumtøka av stevnuni.

KT-felagið hevur heitt á Virkisráðgeving Spf úr Runavík, ið samskipaði stóru altjóða fiskivinnustevnuna, North Atlantic Fish Fair, um at taka sær av samskipanini í sambandi við hetta átak.

-ib

# Úr dagbók Leu í Etiopia




**Forlag Kirkjuliga Missiónsfelagsins hevur givið út bókina Á ferð í Etiopia eftir Leu Juul**

ÚTGÁVA
*Turið Kjølbro*

Fyri seks árum síðani vitjaði Lea Juul Etiopia. Hon skrivaði dagbók á ferðini og tað er henda dagbókin, sum nú verður givin út sum bók. Dagbókin hevur eisini staðið í Kirkjuliga Missiónsblaðnum. Bókin byrjar 14. mai og endar 22. juni í 1995.

Lea Juul skrivar í innganginum, at kristniboðsarbeiðið, sum Kirkjuliga Missiónsfelagið rekur í Etiopia, hevur havt hennara stóra áhuga frá ungum árum av. Hon hevur hoyrt nógv um landið og fólkið ígjøgnum Elsu Jacobsen úr Norðragøtu og Doris Heinesen úr Klaksvík, sum hava starvast sum kristniboðarar harúti.

Bókin er at fáa í bókhandlum, og kann eisini keypast beinleiðis frá forlagnum. Bókin kostar 150 krónur.

# Palle Julsgart sýnir fram í Gallarí Oyggin

Gallarí Oyggin á Tvøroyri hýsir millum ár og dag mongum listamanni. Hesuferð er túrurin so komin til Palla Julsgart. Palle hevur í hesum døgum listaframsýning í Gallarí Oyggin. At tað stundar móti jólum setir eisini sín serliga dám á listaframsýningina.

Møguleiki er at keypa gløgg og holukøkur í Café Art.

Framsýningin við Palla verður fram til 31. desember og opið er hvønn dag frá klokkan 15.00 til klokkan 20.00.

**-ib**

# Rætting

Í Sosialinum hósdagin stóð at lesa um bøkurnar Bókadeild Føroya Lærarafelags júst hevur givið út. Har kom av misgávum at standa, at Astrid Andreassen var rithøvundur, og at hon hevði skrivað bókina um Kuffa. Hetta er tó ikki rætt. Rætti rithøvundurin er Brynhild Andreassen. Vit biðja orsaka mistakið.

**-ib**